# Heppin leki í Norðoyatunlinum

**Møguleikar verða nú kannaðir fyri, um klaksvíkingar kunnu fáa drekkivatn úr Norðoyatunlinum**

Klaksvíkar Kommuna hevur í seinastu mongu árini arbeitt við at økja um drekkivatnsmongdina. Hetta er gjørt við atliti til at hava nóg mikið av vatni, bæði í turrveðri og frosti.

Kommunan hevur fyri nøkrum árum síðani tosa við jarðfrøðing um møguleikan at fara at bora eftir vatni á ávísum økjum. Mælt varð kortini frá hesum, tí møguleikarnir fyri at raka eina keldu vóru so smáir.

Men nú skal so roynast aftur, skrivar Norðlýsið.

## 1500 litrar um minuttin

Tá arbeiðið við at gera Norðoyatunnilin byrjaði á sinni, setti kommunan seg í samband við teir, ið gera tunnilin, og bað teir boða frá, um komið var fram á nógv kelduvatn.

Tá Norðoyatunnilin var komin umleið 1000 metrar inn, rendu teir seg í nógv vatn. Teir komu fram á fleiri lekar, sum vóru uppá 1500 litrar um minuttin.

Kommunan fór beinanvegin at hugsa um ikki vatnið kundi brúkast sum drekkivatn, og gjørdi nakrar kanningar av vatninum. Og á býráðsfundi 2. november í fjør var samtykt at leggja eina vatnleiðing inn í Norðoyatunnilin.

Føroya Konsortiet er í nú ferð við at leggja eina vatnleiðing einar 1235 metrar inn í tunnilin. Síðani skulu nakrar áboringar gerast inn í fjallið, sum skulu íbindast rørleiðingina sum verður løgd í eina grøv í tunnlinum.

Millum jól og nýggjar vóru lagdar 500 metur av hesi rørleiðing. Sostatt er eftir at leggja íalt 530 metrar.

## Nógvar kanningar

Tá rørleiðingin er bundin í keldurnar, verður neyðugt at lata vatnið renna frítt í eitt langt tíðarskeið, meðan vatnmátingar verða gjørdar. Ikki fyrrenn tá kann staðfestast hvussu rávatnsgóðskan er.

Annars eru tað fleiri onnur viðurskifti, sum mugu kannast, og ein verkætlan má gerast fyri at fáa vita samlaðu vatnmongd og kapacitet. Eisini mugu fáast hita- og trýst upplýsingar av vatninum yvir eitt tíðarskeið, fyri at vita um tað koma nakrar broytingar, meðan vatnið rennur úr kelduni.

Men tíðarramman er ógvuliga lítil, og má kommunan fyrst og fremst samla sínar tankar um ætlanina at fáa rør lagt út og áboringar gjørdar, so at fleiri mátingar kunnu gerast.



*Teir eru komnir fram á eina vatnskeldu í Norðoyatunlinum. Rør eru løgd til móttøkuna, men áðrenn nakar sleppur at drekka av vatninum, skal tað kannast væl og virðiliga*

Ein prøvi varð sendir til NIVA í Norra, har teir gjørdu eina meting av prøvanum sum vísir at pH, turbiditur og leiðingarevni er ov høgt. Høga pH-virðið kann stava frá at vatnið er komið í samband við sement, sum er nýtt í stórari mongd til at tetta fyri vatnlekum.

Niðurstøða teirra er eisini, at tað mugu gerast fleiri kanningar av vatninum.

**sb.**

# Føroyskir næmingar biðja fyri øðrum næmingum

BØNARHALD
*Snorri Brend*

Í góðar tríggjar mánaðir hava ungfólk úr stórum pørtum av landinum savnast fyri at biðja fyri sínum vinum og skúlafeløgum. Kring landið eru hesir bønarbólkar skipaðir, sum hava fyri eyga at síggja, at veking brýtur ígjøgnum á skúlunum.

- Longu nú eru fleiri bólkar settir á stovn, men langt er enn á mál, siga fyrireikararnir á heimasíðuni hjá Filadelfia í Havn.

Málið er at seta á stovn bønarbólkar í øllum skúlum landinum.

## Bønarstevna í apríl

Skipanin við hesum tiltakinum er tann, at fólk møtast eina ferð um vikuna at biðja.

Hvør bólkur telur umleið 3-8 persónar. Eru fleiri fólk í bólkinum, so verður bólkurin býttur sundur, so bólkatalið veksur alsamt. Ymiskt er, hvussu býtið er millum kynini og aldur.

Byrjað varð við framhaldsdeildini, men allir flokkar á øllum skúlum fara eisini at verða umboðaðir so við og við.

Tað er tó ikki bara eina ferð um vikuna, at fólkið møtist í bólkunum. Umleið fimtu hvørja viku møtast allir bólkarnir í umráð-num til eitt felags bønarmøti.

Har verður millum annað greitt frá, hvussu tað gongur á hvørjum skúla, sum er umboðaður. Tvær ferðir árliga verður eitt tiltak, sum savnar allar bønarbólkar í landinum. Tað fyrsta tiltakið verður væntandi í apríl mánaði í Havn.

Ein útvarpssending er eisini byrjað í hesum sambandi. Talan er um sendingina Zoé á Lindini, sum er at hoyra hvønn týsdag kl. 16 og sum verður endursend fríggjakvøld kl. 23. Ein heimasíða er eisini í gerð, so fólk kunnu fylgja, hvat hendir á skúlunum.

Tað er Ólavur Guttesen, sum hevur tikið stig til hetta arbeiðið.


**TROYTTUR AV TÍNUM GAMLA TRAKTORI???**
**Her er tann bíliga loysnin**




Ja tú sær/lesur rætt, hann kemur frá Kina, og kostar minni enn helvtina av einum EU framleiddum traktori.

**JINMA 254 4 WD 3 Cyl.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motor: | Diesel 26 | Batt: | 12 V/80 A |
| Gear: | 12/4 | Eginvekt: | 1100 Kg. |
| Startmotor: | 12V/2.2 KW | Hydr. system: | 125 Bar |
| Hydro.servo | | Max ferð: | 27 km/t |
| LxBxH: | 300x132xx192 | Trebunktoph. | |
| PTO: | 540/1000 umdr. | | |

**Prísur u/hús men v/boyla**
**kr. 55.000,-**
Uttan MVG

**Prísur v/húsi**
**kr. 70.000,-**
Uttan MVG

sp/f Ó.K. HEILSØLA & MASKINUR
**Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394**